# Framtíðin avgerandi

**Tað hevur eftir øllum at døma verið framtíðarleikluturin hjá Føroya Fornminnissavnið, sum hevur verið avgerandi fyri, hvør varð settur landsantikvarur**

STARVSSETAN
*Heri á Rógvi*

í brævi til Símun V. Arge ger Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður, greitt, at hesin ikki fær starvið sum landsantikvarur, sum Símun V. Arge hevði søkt, og sama starv, ið hann hevur røkt í fleiri ár.

Skrivið frá landsstýrismanninum er ikki dagfest, og brævið er ikki skrivað á brævpappír frá Mentamálaráðnum og er eiheldur undirskrivað av nøkrum embætisfólki. Tílíkar ásetingar eru ikki nøkur formlig krøv, men góður skikkur, upplýsir Eyðbjørn Larsen á Løgmálaráðnum.

Sjálv sigur Annlis Bjarkhamar um hetta, at talan er um eitt mistak.

– Eg sat heima og skrivaði brævið til Símun Arge eitt vikuskiftið, og eg havi gloymt at seta dagfestin á og senda brævið við pappíri hjá Mentamálaráðnum, sigur Annlis Bjarkhamar.



*Hetta er skrivið, ið Annlis Bjarkhamar sendi Símun V. Arge. Skrivið ger greitt, at Steffen Stummann Hansen er betri hóskaður til starvið. Skrivið hevur onga dagfesting ella undirskrift frá embætisfólki.*

### Lítið konkret

Í brævinum til Símun V. Arge sigur Annlis Bjarkhamar, at setanin av landsantikvari hevur verið eitt ógvuliga trupult mál, sum eisini hevur tikið drúgva tíð at viðgjørt.

Í sjálvum brævinum sigur hon lítið um, hvørjar fortreytir, Símun V. Arge væntar, ella hvørjar eginleikar Steffen Stummann Hansen hevur framum Símun V. Arge.

Sagt verður: "Eftir at hava gjølla viðgjørt umsóknir, tilmæli, samrøður og fortretirnar fyri starvinum er greitt, at úr einum heildarsjónarmiði er annar umsøkjari, sum er betur egnaður til starvið, skrivar Annlis Bjarkhamar."

Bæði í hesum skrivinum og í eftirfylgjandi samrøðum kemur Annlis Bjarkhamar inn á framtíðina hjá stovninum.

– Umframt tær fortreytir, ið settar eru í starvslýsingini, meti eg eisini at hugt eigur at verða at, hvørjar avbjóðingar Fornminnisavn Føroya hevur fyri framman. Hetta er neyðugt fyri at náGreina, hvørjir førleikar og eginleikar dentur eisini eigur at verða lagdur á, tá nýggjur landsantikvarur verður settur.

Ein landsantikvarur, ið skal møta hesum avbjóðingum og bera eitt enn meira virkið og sjónligt Fornminnisavn Føroya inn í framtíðina, sigur Annlis Bjarkhamar í brævinum til Símun Arge.

Framtíðarleikluturin hjá Fornminnissavninum er einasta veruliga ábendingin um orsøkina til, hví annar umsøkjarin verður tikin framum, hóast tvey einmælt tilmæli frá eini setanarnevnd.

Annlis Bjarkhamar vil fegin rudda eina misskiljing av vegnum, tí leysasøgur hava gingið um, at Fornminnissavnið skal knýtast at Fróðskaparsetrinum ella øðrum stovni. Ein av orsøkunum til søgurnar er, at landsstýrismaðurin málbar seg skeivt í Sjónvarpi Føroya og kom at siga Fróðskaparsetrið ístaðinfyri Fornminnissavnið.

– Føroya Fornminnissavn verður tann sami stovnurin, sum vit kenna hann í dag. Tað eru ongar aðrar ætlanir um at broyta stovnin yvirhøvur, staðfestir Annlis Bjarkhamar.

### Tveir umsøkjarar

Eitt skjal, Sosialinum hevur fingið innlit í, vísir, at 20. desember verður endaliga støðutakanin av setanini útsett til hálvan januar. Málið verður so seinni útsett enn longur.

Víst verður í teldubrævi á, at teir "báðir" umsøkjararnir skulu fáa boðini um seinkaða støðutakanina.

Annlis Bjarkhamar sigur, at orsøkin til hetta er tann, at hon 20. desember biðjur um fund við setanarbólkin og fer tá aktivt inn í málið. Greitt var longu tá, at millum teir átta umsøkjararnar vóru teir báðir, Steffen Stummann Hansen og Símun V. Arge, væl betri enn hinir.

# Mannagongdir skulu eftirkannast

**Annlis Bjarkhamar avvísir staðiliga, at hon skal hava framt brot á almenna starvsfólkapolitikkin, tá hesin fyri stuttum er dagførdur, og broytingar ikki vóru galdandi, tá setanin av nýggjum landsantikvari varð viðgjørd**

STARVSSETAN
*Heri á Rógvi*

Annlis Bjarkhamar er framvegis ikki í iva um, at hon tók røttu avgerðina, tá hon setti Steffen Stummann Hansen sum landsantikvar.

Mánamorgunin fekk hon eitt bræv frá Magistarafelagnum, har felagið gav til kennar sína støðu í málinum.

Brævið frá Magistarafelagnum var ikki komin okkum í hendi, áðrenn evstamark, men eftir hvat skilst ger felagið vart við sína ónøgd í sambandi við mannagongdina, og felagið krevur, at setanin av Steffen Stummann Hansen verður anulerað.

– Magistarafelagið hevur óivað sæð skjølini, Símun V. Arge hevur fingið innlit í, og hesi siga bara frá helvtini av málinum. Tískil haldi eg ikki, at tey kunnu gera nakrar fullar niðurstøður um alt málið, sigur Annlis Bjarkhamar.

Steffen Stummann Hansen, sum óivað kann fáa hendur á hinari helvtini á málinum, er limur í danska Magistarafelagnum.

Annlis Bjarkhamar fer at svara Magistarafelagnum aftur, men skrivið frá teimum fær ikki hana at broyta hugsan.

Landsstýrismaðurin hevur fingið álagt tagnarskyldu, og Annlis Bjarkhamar sigur, at hon als ikki er bilsin yvir innihaldið í brævinum, og hon eggjar til, at fólk taka stig til at kanna málið til botns, soleiðis at alt kemur fram.

Sjálv hevur hon sett sær fyri, at allur setanarpolitikkurin og mannagongdir í hesum sambandi hjá Mentamálaráðnum skulu eftirkannast.

### Nýggjur setanarpolitikkur

Annlis Bjarkhamar avvísir staðiliga, at hon skal hava framt brot á almenna starvsfólkapolitikkin, tá hesin fyri stuttum er dagførdur, og broytingar ikki vóru galdandi, tá setanin av nýggjum landsantikvari varð viðgjørd.

– Vit fingu nýggja politikkin sendandi í februar, og tá varð málið liðugt viðgjørt. Ùtfrá gamla starvsfólkapolitikkinum hava vit ikki framt nakað brot, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hon vísir á, at tíðarfreistin við at svara umsóknum innan tríggjar vikur ikki var galdandi við gamla politikkinum, og hon varð heldur ikki kravd at senda nakað bræv við grundgevingum til Símun V. Arge, men gjørdi hetta kortini.

### Fylgjur

Annlis Bjarkhamar hevur áður sagt, at hennara avgerð ikki er nakað misálit á setanarnevndina, og hon hevur nýtt arbeiðið hjá bólkinum sum part av grundarlagnum fyri setanini. Hon vil heldur ikki koma nærri inn á, hvørjar møguligar fylgjur hetta málið fær fyri manningina í setanarbólkinum, sum eftir hennara tykki ikki gjørt nóg greið tilmæli.



# Aðalstjórin ábyrgdina av setanarbólki

**Sambært setanarpolitikkinum hjá Mentamálaráðnum er tað Petur Petersen, sum hevur ábyrgdina av finna limir til setanarnevndina, sum hann sjálvur var formaður fyri**

UMSITING
*Heri á Rógvi*

Eftir umbøn hava føroysku fjølmiðlarnir fingið innlit í nøkur av skjølunum í sambandi við setanina av nýggjum landsantikvari.

Nøkur skjøl eru vald út, men flestu teirra varpa ikki tað allarminsta av nýggjum ljósi á málið.

Millum skjølini er eisini avrit av mannagongdini í sambandi við setanarpolitikkin hjá Landsstýrinum og Mentamálaráðnum.

Endamálið við hesum góða setanarpolitikki er at tryggja, at tann besti umsøkjarin verður settur í starv.

Aðalstjórin hevur ábyrgdina av, at alt gongur rætt fyri saman við fyrisettum umboði fyri avvarðandi deild – í hesum førinum mentamáladeild.

Tá ið aðalstjórin hevur tilnevnt setanarnevndina, er tað formaðurin í nevndini, sum hevur ábyrgdina av mannagongdini. Í hesum førinum er formaðurin fyri setanarnevndina og aðalstjórin ein og sami persónur – Petur Petersen.

### Aðalstjórin formaður

Í sambandi við eina starvssetan, so liggur mesta ábyrgdina á sjálvan aðalstjóranum, Petur Petersen.

Hann hevur ábyrgdina av lýsingini, og tað er somuleiðis aðalstjórin, sum setir eina setanarnevnd at viðgera umsóknirnar og at gera eina innstilling.

Setanarnevndin var í hesum førinum mannað við Petur Petersen sjálvum sum formanni, Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, Poul Nolsøe, løgfrøðingafulltrúa, og Andras M. Mortensen, starvsfólkaumboð fyri Fornminnissavnið.

Setanarnevndin viðgerð umsóknirnar útfrá krøvunum til starvið.

Annlis Bjarkhamar sigur, at hetta við aðalstjórin er formaður fyri eina setanarnevnd eftir øllum at døma er siðvenja í Mentamálaráðnum, og hetta sigur hon seg hava tikið fyri góða vøru. Men eftirfylgjandi vil hetta saman við allari mannagongd verða tikið upp til viðgerðar.

Flestum kunnugt innstillaði setanarnevndin einmælt Símun V. Arge tvær ferðir til starvið.

Somuleiðis stendur at lesa í setanarpolitikkinum:

“Aðalstjórin tekur støðu til tilmælið og setur starvið endaliga. Í førum, har tað er ásett, verður landsstýrismaðurin tikin við í avgerðini. Aðalstjórin kunnar altíð landsstýrismannin um ætlaðar setanir.”

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa hendur á Petur Petersen til eina viðmerking.




Prísir

# Prísbroytingar



## Bygdaleiðir – prísir fyri ferðafólk

| | | 1<br>0-7 km | 2<br>8-15 km | 3<br>16-25 km | 4<br>26-37 km | 5<br>38-51 km | 6<br>>52 km | Undirsjóvartunnilin |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vaksin | Einvegis ferðaseðil | kr. 10 | kr. 20 | kr. 30 | kr. 40 | kr. 50 | kr. 60 | kr. 50 |
| | 10-túrakort | kr. 85 | kr. 170 | kr. 255 | kr. 340 | kr. 425 | kr. 510 | kr. 425 |
| | Mánaðarkort | kr. 300 | kr. 400 | kr. 450 | kr. 600 | kr. 750 | kr. 825 | kr. 450 |
| Børn og pensionistar | Einvegis ferðaseðil | kr. 8 | kr. 10 | kr. 15 | kr. 20 | kr. 25 | kr. 30 | kr. 25 |
| | 10-túrakort | kr. 70 | kr. 85 | kr. 130 | kr. 170 | kr. 220 | kr. 255 | kr. 130 |
| | Mánaðarkort | kr. 150 | kr. 200 | kr. 225 | kr. 300 | kr. 375 | kr. 410 | kr. 225 |
| Lesandi | Einvegis ferðaseðil | kr. 8 | kr. 16 | kr. 24 | kr. 32 | kr. 40 | kr. 48 | kr. 40 |

## Ferjur – prísir fyri ferðafólk og akfør

| | Styttri leiðir | Suðuroyarleiðin |
|---|---|---|
| Vaksin | kr. 35 | kr. 75 |
| Mánaðarkort vaksin | kr. 525 | kr. 1.125 |
| 10-túrakort vaksin | kr. 300 | kr. 640 |
| Børn og pensionistar | kr. 15 | kr. 35 |
| Mánaðarkort børn | kr. 225 | kr. 525 |
| 10-túrakort børn | kr. 130 | kr. 300 |
| Lesandi | kr. 30 | kr. 60 |
| Akfør | | |
| Súkkla | kr. 10 | kr. 20 |
| Motorsúkklur | kr. 20 | kr. 40 |
| Persónbilur <5m | kr. 90 | kr. 130 |
| Persónbilur v/viðfarisvogni | kr. 135 | kr. 195 |
| 10-túrakort persónbilur | kr. 765 | kr. 1.105 |
| Vøruvognar og lastbilar <5 | kr. 120 | kr. 220 |
| Vøruvognar og lastbilar 5-7 | kr. 210 | kr. 430 |
| Vøruvognar og lastbilar 7-9 | kr. 310 | kr. 610 |
| Vøruvognar og lastbilar 9-11 | kr. 390 | kr. 780 |
| Vøruvognar og lastbilar 11-13 | kr. 470 | kr. 950 |
| Vøruvognar og lastbilar 13-15 | kr. 550 | kr. 1.100 |
| Vøruvognar og lastbilar >15 | kr. 625 | kr. 1.250 |
| Bussar og hýruvognar <5 m | kr. 90 | kr. 160 |
| Bussar og hýruvognar 5-7 | kr. 130 | kr. 260 |
| Bussar og hýruvognar 7-9 | kr. 160 | kr. 330 |
| Bussar og hýruvognar 9-11 | kr. 200 | kr. 400 |
| Bussar og hýruvognar 11-13 | kr. 240 | kr. 470 |
| Bussar og hýruvognar 13-15 | kr. 280 | kr. 550 |
| Bussar og hýruvognar >15 | kr. 340 | kr. 680 |

**Prísbroytingar á Farmaleiðum:**
Víst verður til heimasíðuna

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30